Stinga høvdini saman eftir valið

Arbeiðsgevarafelagið fer at tosa við fakfeløgini um at lønarkrøv og skattalætta beint eftir løgtingsvalið

LØNARKRØV OG SKATTALÆTTI

Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Beint eftir løgtingsvalið fara arbeiðsgevararnir at boðsenda fakfeløgunum á fund at tosa saman um lønarvøksturin tey komandi árini.

Tað samtykti arbeiðsgevarafelagið á nevndarfundi mikudagin.

Sostatt løgdust arbeiðsgevararnir ikki á boðini, nú umboð fyri fakfeløg hava latið dyrnar upp fyri einum kjaki um, hvussu nógv tímalønirnar skulu hækka tey komandu árini.

Tað er serliga formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag, sum hevur mælt til, at fáa eina avtalu ílag ímillum arbeiðsgevarar, fakfeløg og landsstýrið um, at tímalønin skal ikki hækka meiri.

Men fyri at tey tímaløntu ikki skulu verða verri fyri, er tað samstundis ein treyt, at skattur og avgjøld samstundis lækka, eins og prísstøgur skal setast í verk, so at keypiorkan kortini veksur.

Men eisini forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag hevur boðað frá, at hon kann umhugsa at taka slíkar samráðingar um, men lønarsteðg vil hon ikki hoyra talan um. Hjá henni kann talan í mesta lagi vera um at avmarka lønarkrøvini afturfyri at fáa skattalættar.

–Tað er ikki eitt krav frá arbeiðsgevarunum, at tímalønin ikki skal hækka meir, sigur Jan Mortensen, stjóri í vinnuhúsinum

Skal takast upp

Mikudagin høvdu arbeiðsgevararnir fund og har var niðurstøðan, at hetta er ein spurningur, sum eigur at verða tikin upp.

Men teir halda eisini, at tað er nyttuleyst at taka hetta málið upp beint nú, valstríðið leikar á sum harðast og tað verður í hvussu so er ikki, fyrrenn nýtt landsstýrið er skipað, at nøkur politisk viðgerð av hesum málið kann fara fram.

– Men so skjótt, valið er av, fara vit at venda okkum til fakfeløgini at tosa um hesi viðurskifti, sigur Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum.

Hann sigur, at á hesin fundinum við fakfeløgini er ætlanin at vita, akkurát, hvar partarnir standa í hesum máli, so at teir skilja hvønn annan.

Tað, sum fakfeløgini síggja fyri sær, er, at tey skulu semjast við arbeiðsgevararnar um hesi viðurskiftini og so skulu báðir partar við einum felags uppleggi taka samráðingar upp við landsstýrið.

Og tað er eisini hesin framferðarhátturin, sum arbeiðsgevararnir halda vera tann rætti.

Krevja ikki lønarsteðg

Men stjórin í Vinnuhúsinum leggur dent á, at arbeiðsgevararnir krevja ikki lønarsteðg.

– Tankin um, at lønin ikki skal hækka meiri, er ikki komin frá okkum. Tað, sum hevur týdning fyri okkum, er, at hesi viðurskiftini verða tikin upp til viðgerðar og at útgangsstøðið fyri hesi viðgerð er tann veruliga støðan, sum virkini eru í.

Og tann veruliga støðan, sum virkini eru í, er, at tey hava tað sera trupult og heldur hendan gongdin fram, stúra vit fyri, at arbeiðspláss í størri og størri mun verða flutt av landinum.

Men, hvussu stórur lønarvøksturin skal vera, vil hann ikki siga nakað um. Somuleiðis heldur hann eisini, at tað er ov tíðliga at viðgera smálutir í málinum.

– Vit síggja longu nú at arbeiðspláss í stóran mun verða flutt av landinum. Tað vísur allur tann nógvi fiskurin, sum verður fluttur óvirkaður av landinum.

Orsøkin til tað er, at virkini eru ikki kappingarfør og fáa tískil ikki keypt fiskin.

– Tí er tað av sera stórum týdningi, at gongdin í lønunum samsvarar við tann veruleika, sum virkini arbeiða undir.

Hann vísir á, at hesi seinastu árini er kappingarstøðið hjá okkum versna heilt munandi afturímóti vøkstrinum í grannalondum okkara.

– Mesti fiskurin, sum fer óvirkaður av landinum, fer til Skotlands, har hevur lønarvøksturin verið helvtin av okkara. Tá ið so lønin heldur ikki er meiri enn helvtin av okkara, rakar tað fyra ferðir so hart hjá okkum. Í Skotlandi hevur lønarvøksturin verið kanska 2,5% um árið av eini tímaløn upp á 50 krónur, men hjá okkum hevur lønarvøksturin verið 5% um árið av eini løn sum táttar í 100 krónur um tíman.

– Tí versnar okkara kappingarførið so ómetaliga skjótt og tað er av størsta týdningi at hesin spurningurin verður tikin upp.

Fakfeløgini hava boðað frá, at tað, sum hevur týdning fyri tey, er, at teirra limir ikki skulu vera verri fyri.

Og tað skilir Jan Mortensen væl.

– Men tað kann gerast upp á nógvar mátar. Ein máti er at gera tað bíligari at liva, tí so verða tey betri fyri.

Tann, sum hevur talað harðast ímóti at tengja lønarsamráðingar og skattalættar saman, er formaðurin í Starvsmannafelagnum.

Eisini tað skilir Jan Mortensen.

– Lækkar skatturin er tað fyrst og fremst limaskarðin hjá Starvsmannafelagnum, sum verður raktur, tí limatalið í Starvsmannafelagnum er tengd at, hvussu nógvan skatt tað almenna krevur inn.

– Men í hesum málinum er kanska í veruleikanum andsøgn ímillum áhugamálini hjá fakfeløgunum á privata- og á almenna arbeiðsmarknaðinum, sigur Jan Mortensen.

– Heldur hendan gongdin fram, fer talið á verkafólkið at minka, tí arbeiðspláss verða flutt av landinum, men tær almennu útreiðslurnar hækka og tað styrkir grundarlagið undir starvsmannafelagnum.

Byggja skúlan út fyri yvir 30 milliónir

Kommunurnar í Sundalagnum taka eitt ódnartak fyri at byggja felagsskúlan á Oyrabakka út

SKÚLABYGGING

Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Nú skal felagsskúlin við Oyrabakka byggjast út.

Og tað er ikki hissini útbygging, tí tilsamans fer arbeiðið mett at kosta heilar 30,8 milliónir.

Hetta er sostatt eitt ódnartak hjá teimum sjey kommununum, sum vara av skúlanum.

Tær kommunurnar, sum standa saman um byggingina, eru tey seks kommununar, sum hava gjørt av at leggja saman í Sunda Kommunu. Tær eru Sunda-Hósvíkar- Haldarsvíkar-Gjáar- Saksunar- og Hvalvíkar Kommuna.

Men afturat teimum er Eiðis Kommuna við í útbyggingini.

Tað er Sofus Johannesen, sum er formaður í stýrinum fyri felagsskúlan.

Hann sigur, at skúlin varð bygdir í 1974. Tað vóru norðmenn, sum bygdi hann og teir mettu, at krøvini til skúlabygging broyttust so skjótt, at tað loysti seg ikki at byggja skúlar, sum hildu í meiri enn 20 ár.

Nú er Felagsskúlin 30 ár og treingir til ábøtir.

Sofus Johannesen sigur, at innan skal ein stórur partur av skúlanum takast niður og byggjast av nýggjum, eins og hann skal byggjast út.

Tilsamans er arbeiðið mett at kosta 30,8 milliónir.

Tað er eitt stórt tak hjá hesum kommununum at fara undir. Men samstundis er tað greitt, at hesar 30,8 milliónirnar eru avgjørt markið fyri, hvussu nógv útbyggingin skal kosta.

Formaðurin í stýrinum fyri skúlan sigur, at ætlanin er at bjóða arbeiðið út í næstum og at fara undir tað tíðliga í summar.

Men arbeiðið er so umfatandi, at tað fer at taka eini tvey, trý ár.

Í tí partinum, sum skal takast niður og byggjast av nýggjum, er ætlanin at gera skúlastovurnar størri. Í løtuni eru tær einar 50 fermetrar, men tær nýggju stovurnar verða einar 65 fermetrar.

Annars er ætlanin at byggja nýggjar serstovur, nýggja skúlahøll og matstovu. Harumframt skulu eisini umklæðingarrúmini til fimleikarhøllina og svimjihøllina, gerast.

Sofus Johannesen sigur, at hóast hetta er eitt tungt tak, er hetta neyðugt fyri at ganga undir treytunum í nýggju skúlalógini.

– Tað er ógvuliga umráðandi at hava ein góðan skúla.

Á Oyrabakka ganga 115-120 næmingar í framhaldsdeildini. Men børn úr bygdarskúlunum, sum eru við í skúlanum, eru eisini á Oyrabakka og svimja og gera fimleik Sofus Johannesen væntar, at børnini úr bygdarskúlunum koma at brúka nøkur av serstovunum.

Hann sigur, at kommununar, sum eru saman um arbeiðið, hava samtykt at gera arbeiðið.

Men nú figgjarætlanin er løgd, skulu tær eisini góðtaka hana og at betala sín part av arbeiðnum.



Skúlin á Oyrabakka verður sum spildurnýggjur, tá ið hann er liðugur, og so verður hann munandi størri eisini við matstovu, serstovum og rúmligum flokshølum

Persónliga sambandið er burtur

Tveir av royndastu politikkarunum í nýggjari tíð, Óli Breckmann og Vilhelm Johannesen, harmast um, at persónliga sambandið við veljaran er við at fána burtur. Báðir hava verið fastir fúsir í valstríðum, síðan fyrst í sjeytiárunum

VALSTRÍÐ

Páll Holm Johannesen
pall@sosialurin.fo

Heimasíður, SMS-boð, faldarar, rúgvuvís av lesarabrøvum, ráðgevarar av alskyns slagi og sjálvglað valevni, sum ikki fýra fyri at gera metur stórar plakatir av sær sjálvum. Hetta eru millum átøkini, sum valevnini til løgtingsvalið í 2004 nýta fyri at tekkjast føroyska veljaranum. Nógv vilja vera við, at valstríðið í ár minnir ikki sørt um fjákutu valstríðini í Amerika.

Ein av flokkunum í valstríðnum hevur herrópið "Fram kemur hann, ið hóvliga fer". At kalla framferðina hjá mongu av valevnunum fyri hóvliga, er at taka dýran til, tí føroyski veljarin verður dagliga díktur undir við valtilfari.

Fyri at leita aftur til dagarnar, har føroysk valstríð vóru føroysk og ikki amerikonsk, hava vit sett tveimum av royndastu politikkarunum í nýggjari tíð, Óla Breckmann og Vilhelm Johannesen, stevnu til at hugleiða um valstríðini í 70 árunum

–Teir gomlu høvdu lagt lítið í plakatirnar í dag. Tær eru ov perssónsfikseraðar og teir gomlu høvdu ikki dámt, at valevnini gjørdu persónligar plakatir í manshædd, tí tað hevði verið tekin um persónar, sum vóru ov glaðir fyri seg sjálvar, heldur Óli Breckmann

Mynd: Savnsmynd

Meira persónligt

Óli Breckmann varð fyrstu ferð valdur á ting í1974 fyri Fólkaflokkin. Formaðurin í tingbólki fólkafloksins hevur sostatt møguleika at halda sín 30 ára starvsdag í løgtinginum seinni í ár, men hetta er sjálvsagt treytað av, at Óli verður valdur á ting komandi týsdag

Vilhelm Johannesen stillaði fyri fyrstu ferð upp í 1970, men varð ikki valdur fyrr enn í1980. Óli og Vilhelm hava fört valstrið í hvør sínum herðashorni Føroyum. Breckmann hevur rikið í miðstaðarøkinum, meðan Johannesen hevur rikið í Norðoyggjum.

Hóast valstríðini í miðstaðarøkinum og í Norðoyggjum ikki eru so lík, eru báðir á einum máli um, at persónliga sambandið við veljaran er við at fána burtur. Óli og Vilhelm settu, í hvør sínum lagi, undir valstríðunum í 70 árunum nógva tíð av til at vitja fólki í húsum teirra og tala fyri sær og sínum flokki.

– Stemningurin var heilt serligur, tá vit gingu húsagongd. Fólk vóru í góðum hýri og heimini vóru fjálg og hugnalig at koma í, greiðir Óli Breckmann frá. Húsagongd var vanliga bæði áðrenn og aftaná valfundirnar á teimum smærru støðunum. Vilhelm Johannesen sigur frá, at í Norðoyggjum var vanligt at fara bæði til Fugloyar og Svínoyar á valfund og tá vórðu flestu húsini í bygdunum eisini vitjað.

Teir halda, at valevnini í 70 árunum komu í nógv størri mun út persónliga til veljaran, meðan samskiftið millum valevni og veljara fer í dag gjøgnum loftmiðlar og alnetið. Í Norðoyggjum vóru valevnini á nærum hvørjari bygd á Svínoy, Fugloy, Kunoy, Kallsoy og Borðoy.

Valevnini ferðaðust millum oyggjarnar í báti. Túrarnar vóru ikki heilt vandaleysir og tað kom meir enn so fyri, at tað varð so ókyrt, at valevnini máttu fáa ein enda úr landi og verða togaði í land. –Tá ráddi um ikki at verða bangin, tí tað kundi kosta atkvøður, um ein ikki tordi at taka í endan og tí gjørdi mann alt fyri at koma í land, sigur Vilhelm Johannesen

Í miðstaðarøkinum fór stórur partur av agitatiónini fram á húsahornum í Havn, har valevnini í hvør sínum lagi royndu at sannføra veljaran um at velja seg. Óli Breckmann sigur, at valevnini úr Havn komu eisini út um høvuðstaðin. Valfundir vóru bæði Nólsoy og Kaldbak.

Strævið

Vilhelm Johannesen heldur, at tað gerst alsamt strævnari at fylgja við í valstríðunum. – Mann verður bombarderaður við brævgreinum, faldarum, sjónvarp og útvarpi. Útvarpið og sjónvarpið hava valsendingar samstundis og tí verður ein noyddur at fylgja við í báðum í senn og tað er strævið, sigur hann.

Javnaðartingmaðurin í Norðoyggum síðan 1980 heldur tað er harmiligt, at persónliga sambandið við veljaran er burtur. Hann greiðir frá, at Javnaðarflokkurin í Norðoyggjum fór seinasta val undir eitt átak fyri at halda fast í persónliga sambandinum við veljaran. Valevnini í Norðoyggjum vitja fyritøkur í Klaksvík og greiða stutt frá, hvørji valevnini eru og hvørji aðalmálini hjá flokkinum eru.

– At vitja fólk persónliga dámar mær nógv betur enn roksa við heimasíður og SMS boð, sigur Vilhelm Johannesen

Forkunnugar plakatir

Í dag ber ikki til at venda sær, uttan, at metur langar plakatir av valevnum eru at síggjast kring alt landið. Plakaturnar koma upp fleiri vikur undan sjálvum valdegnum. Talið av plakatum økist fyri hvørt val og heldur enn at prýða býin, vil onkur verða við at plakatirnar misprýða býin.

Leita vit nøkur ár aftur, komu valplakatirnar ikki upp at hanga fyrr enn sjálvan valdagin. Maður fór vanliga av húsi kvøldið fyri valdagin og tá fólk vaknaði sjálvan valdagin var býurin prýddur við alskins valplakatum.

– Teir gomlu høvdu lagt lítið í plakatirnar í dag. Tær eru ov perssónsfikseraðar og teir gomlu høvdu ikki dámt, at valevnini gjørdu persónligar plakatir í manshædd, tí tað hevði verið tekin um persónar, sum vóru ov glaðir fyri seg sjálvar, heldur Óli Breckmann.

Óli fortelur, at á Meinigheitshúsinum vóru vanliga nógvar plakatir. Trælyktapelarnir runt í býnum vóru eisini nógv nýttir. Flokkarnir høvdu teknarar at gera plakatir og tað var ein serliga heiður, um mann var á eini plakat, greiðir Óli Breckmann frá.

Hann minnist serliga eina plakat, sum Tjóðveldisflokkurin ella Javnaðarflokkurin høvdu gjørt av sær til løgtingsvalið í 1974, har hann varð keipumyndaður sum ein stór hóttan fyri Føroyar.

– Í mínum fyrsta valstríði varð ein heil plakat gjørd av mær og tað var stórt tá. Eg var errin av at verða avmyndaður og eg fekk seinni plakatina í varðveitslu, sigur Óli Breckmann.

Í Norðoyggjum var Tjóðveldisflokkurin fyrstur við plakatum. Vilhelm sigur seg minnast frá valinum í 1966, at Tjóðveldisflokkurin rættiliga brynjaði seg út við plakatum. – Teir høvdu eina rúgvu av plakatum og bannarum í býnum. Eg kann eisini minnast, at teir eisini lýstu við elektriskum perum á Kjøli. Perurnar rukku yvir góðar 300 metur og á Kjøli stóð, Vel tjóðveldi, fortelur Vilhelm Johannesen

Hann leggur skemtandi afturat, at Tjóðveldisflokkurin fekk kortini eitt óvanliga vánaligt val í Norðoyggjum hetta løgtingsvalið.

Í valstíðnum 2004 ræður um at hava so stórar plakatir sum gjørligt. Fyrr varð góðskan av teknaðu plakatunum sett í hásætið. Her er ein tilvildarlig plakat hjá Tjóðveldisflokkinum avmyndað miðskeiðis í nítiárunum

Mynd: Savnsmynd